Norðurlendskir Javnaðarflokkar:

# Stolt - tó ikki nøgd

**Hóast arbeiðararørslan og arbeiðaraflokkarnir í norðanlondum hava vunnið nógvar politiskar sigrar, verður altíð neyðugt at halda áfram við stríðnum fyri betri rættindum og møguleikum hjá øllum í samfelagnum**

POLITIKKUR
*Tíðindaskriv*

Hetta var eisini grundarlagið fyri fundinum hjá formonnunum í samstarvsnevndini hjá norðurlendsku arbeiðararørsluni - SAMAK - tá teir hittust í Íslandi vikuskiftið 7. og 8. august. Fundurin varð hildin á søguligu oynni Viðey, ið liggur beint uttan fyri Reykjavík. Kristian Magnussen, formaður í tingbólki Javnaðarfloksins, umboðaði Javnaðarflokkin á fundinum.

Formenninir viðgjørdu støðuna í ymsu norðurlendsku londunum. Umframt vanligu hjartamálini hjá javnaðarflokkunum, viðgjørdu formenninir m.a. fyrimunir og vansar við globaliseringini, arbeiðsmarknaðarmál, serliga støðuna hjá teimum eldru á arbeiðsmarknaðinum, viðurskiftini hjá útlendingum á arbeiðsmarknaðinum, evropeiskt samstarv og møguleikarnar at arbeiða fyri, at núverandi og møguliga komandi norðurlendsk ES-lond kunnu varðveita ræðisrættin á fiskivinnuøkinum. Eisini varð umrøtt, hvørji tiltøk skulu setast í verk, fyri at byrgja upp fyri vandanum við versnandi fólkaheilsu, sigur Javnaðarflokkurin í tíðindaskrivi.



*Nakrir av høvduspersónunum á fundinum vóru: frá vinstru Jens Stoltenberg, formaður í norska Javnaðarflokkinum, Gretar Thorsteinsson, formaður í íslendska fakfelagssamtakinum, Össur Skarphéðinsson, formaður í íslendska Javnaðarflokkinum, Göran Persson, formaður í svenska Javnaðarflokkinun, Kristian Magnussen, formaður í tingbólki Javnaðarfloksins, Barbro Sundback, forkvinna í álendska Javnaðarflokkinum og Mogens Lykketoft, formaður í danska Javnaðarflokkinum.*

# Føroyar ikki nóg frammaliga

**- Føroyingar eru ikki komnir nóg langt innan varandi orkukeldur, sigur Klæmint Weihe, stjóri í SEV**

ORKA
*Hans Kárason Mikkelsen*
*hans@sosialurin.fo*

Men er Bjarni Djurholm, landsstýrismaður við orkumálum, samdur í hesum sjónarmiðnum?

- Tað eri eg. Ein av orsøkunum til hetta er, at vit hava ikki havt ein yvirordnaðan orkupolitikk í Føroyum. Tað arbeiðið er farið í gongd nú, og tað verður ásett, at tað er ein landspolitisk uppgáva at røkja og røkka hasum endamálinum, sigur Bjarni Djurholm.

Landsstýrismaðurin hevur á orkuráðstevnu í Íslandi boðað frá, at Føroya Landsstýri til eina og hvørja tíð vil samstarva við hini londini í útnorði um at menna alternativar orkukeldur.

### Verulig politisk stig

- Eg haldi, at eg kann siga, at hetta er fyrstu ferð, at mann hevur tikið verulig politisk stig í Føroyum fyri at loysa upp fyri, at vit náa longri innan varandi orkukeldur, sigur Bjarni Djurholm.

Bjarni Djurholm sigur, at størri partur av orkunýtsluni skal byggja á ikki dálkandi og varandi orkukeldur. Men spurningurin er, hvussu lang tíð skal ganga, innan ein ávísur, og helst stórur, partur av føroysku orkuni skal koma frá varandi orkukeldum.

Poul Michelsen, tingmaður, er ógvuliga kategoriskur í sínum sjórnarmiðið. Hann sigur, at tíðarhorisonturin er væl minni, enn vit fyrr hava hildið.

### Ringa tíð

- Tað er onki at taka feil av, at innan tíggju til fimtan ár, tá skulu vit hava ein betýðiliga størri part av okkara orku umgjørda til grøna vinnu, sigur Poul Michelsen, tingmaður fyri Fólkaflokkin.

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður við orkumálum, sigur, at samgongan hevur lagt stóran dent á orku- og umhvørvisspurningin og hevur ásett tað beinleiðis í samgonguskjalinum, at vit skulu røkka nøkrum setningum.

### Føroyar sum royndarland

- Í tí sambandinum hava vit boðið tað føroyska økið út til royndarøkið, soleiðis at mann í norðurlendskum samanhangi kann brúka føroyska økið sum royndarøkið innanfyri alternativa orku.

Bjarni Djurholm sigur, at seinni í heyst fara vit at frætta frá Norðurlandaráðnum, hvørt Føroyar kunnu verða royndarøkið. Landsstýrismaðurin sigur, at Føroyar liggja frammaliga í hesi kappingini.

## Móttøkan fyri Jupiter verður í dag

JUPITER
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Ætlandi skuldi kombineraði nóta-og trolbáturin, sum P/F Driftin í Gøtu hevur keypt úr Skotlandi, koma til landið í kvøld.

Atli Hansen, reiðari, segði úr Skotlandi týsdagin, at teir fóru ikki út við skipinum, fyrr enn øll viðurskifti vóru greið.

Trupulleikar hava verið við køliútbúnaðinum, og tí kemur nýggi Jupiter ikki til Føroya fyrr enn leygardagin, tá ið skipað verður fyri móttøku á bryggjuni í Gøtu.

Skipið, sum er keypt úr Peterhead, kallast Pathway. Tað er bygt í 1998 og er 1384 brt. stórt.

Gamli Jupiter, sum er bygdur í 1978, verður lagdur, tá ið hin báturin kemur í flotan.

P/F Driftin keypti gamla Jupiter í 1999, og í Noregi er hann best kendur undir navninum, Eros.

Atli Hansen sigur, at gamli Jupiter verður seldur.

Reiðarin vil ikki upplýsa, hvussu nógv Pathway verður keyptur fyri.

# Eingin vil tosa um Silberbauer

**Bæði ákærarnir á fútaskrivstovuni og løgreglan siga seg hava tagnarskyldu í málinum um rúsdrekkakoyringina í Tórshavn hjá 22 ára gomlu stjørnuni hjá FC Keypmannahavn, Michael Silberbauer**

RÚSDREKKA
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*

12. juli var danska fótbóltsstjørnan í FC Keypmannahavn, 22 ára gamli Michael Silberbauer, á forsíðuni á Sosialinum orsakað av, at hann mikukvøldið 8. juli varð tikin fyri rúsdrekkakoyring í miðbýnum í Havnini beint eftir 4-1 sigurin á Tórsvølli móti HB.

### Blóðroyndin komin

Á løgreglustøðini í Havn tók lækni hetta kvøldið eina blóðroynd av Silberbauer, sum skal staðfesta alkoholnøgd, og royndin varð send til Danmarkar.

Nú er royndin nakað síðani komin aftur til Føroya, og úrslitið av henni er avgerandi fyri, hvørjar avleiðingarnar vera fyri rúsdrekkakoyringina hjá FCK stjørnuni. Málið verður viðgjørt í Føroyum.

### Tagnarskylda

Men eingin vil siga nakað um málið, tí talan er um eitt persónsmál. Hvørki á løgreglustøðini ella hjá ákærunum á fútaskrivstovuni eru nakrar upplýsingar at fáa um málið, har víst verður til tagnarskylduna, tá talan er um persónlig viðurskifti.

Líka síðani hendingina hava danskir miðlar áhaldandi fregnast um gongdina í málinum, men teir noyðast helst at seta seg í samband við Silberbauer sjálvan ella felag hansara FC Keypmannahavn, um svar skal fáast á spurninginum, um Silberbauer verður ákærdur ella ikki.

Í Danmark hevur Ekstrablaðið gitt, at Silberbauer sleppur við eini bót, men á BT vænta teir eitt sakarmál.



*Hvørki ákærarnir ella løgreglan vil siga nakað um rúsdrekkakoyringina hjá FCK stjørnuni Michael Silberbauer, tí talan er um eitt persónsmál, har tagnarskyldan er galdandi*



## Bygdardagur í Miðvági

**Í dag, leygardagin, skipa MB og Miðvágs Róðrarfelag fyri árliga bygdardegnum við fótbólti, motorsúkklukappkoyring, tivoli o. ø**

BYGDARDAGUR
*Tíðindaskriv*

Byrjað verður í morgun, leygarmorgunin, kl 10 við, fótbóltskapping verður fyri tey yngstu og motorsúkklukappkoyring.

Dysturin millum FS Vágar og VB í aðru deild er í hesum sambandi fluttur til Miðvágs og verður leiktur kl 15.

Mini tivoli við hoppiborg og mini motorsúklum og øðrum verður á íttrottarøkinum.

Um kvøldið kl 20 verður Meksikansk uppboðssøla við seyði.

Dagurin endar við livandi tónleiki, har Sámal Ravnsfjall og aðrir kendir miðvingar undirhalda. Eisini verður føroyskur dansur og felags sangur.



# Hvar fór Skúladepilin í Marknagili?

**Egon Øregaard, skúlastjóri á Tekniska skúla í Havn, undrast stórliga á, at Skúladepilin í Marknagili onga umtalu hevur fingið í seinastuni. – Tað tykist sum um ætlanin er blivin burtur, tí nú verða aðrir skúlar aftur raðfestir hægri enn vit, sigur Egon Øregaard**

SKÚLADEPILIN
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*

Í november mánað í fjør var eitt álit um Skúladepilin í Marknagili borið niðan í Mentamálaráðið. Serliga Tjóðveldisflokkurin arbeiddi hart fyri uppskotinum, sum eftir valið tó tykist vera dottið burtur ímillum onnur mál.

Egon Øregaard, skúlastjóri á Tekniska skúla í Havn harmast almikið um horvna áhugan fyri málinum. Málið hastar, tí skúlarnir eru nevniliga í svárari hølisneyð, sigur hann.



*– Tað er óalmindiliga skuffandi, at vit enn einaferð verða yvirhálaðir á málstrinkuni, sigur Egon Øregaard, skúlastjóri á Tekniska skúla í Havn*

### Einaferð enn yvirhálaðir

Egon Øregaard sigur, at meðan undanfarna samgonga sat, kom verulig ferð á arbeiðið við Skúladeplinum í Marknagili. Sjálvur sat hann í einum arbeiðsbólki, sum arbeiddi ógvuliga seriøst við ætlanini. Meiningin var, at leggja Tekniska skúla, Studentaskúlan og HF-skeiði í Hoydølum og Handilsskúlan undir somu lon í Markagili. – Vit arbeiddu seriøst, og vit gjørdu eitt sera gott arbeiði. Tá álitið varð borið niðan í mentamálaráðið væntaðu vit veruliga, at okkurt fór at henda. Men síðani kom valið og legði lok á arbeiðið, greiðir Egon Øregaard frá.

Hann sigur seg tó undrast stórliga á, at sitandi samgonga hevur sýnt ætlanini so lítlan áhuga. – Vit væntaðu at nýggja samgongan fór at taka við, har hin slepti. Álitið liggur jú í Mentamálaráðnum og er klárt at leggja fram. Men tað skuffaði meg stórliga at hoyra løgmansrøðuna, har Skúladepilin ikki varð nevndur við einum orði. Hinvegin fekk Fiskivinnuskúlin drúgva umtalu, og sagt var, at ein verklagslóg skuldi evnast til tann skúlan, sigur Egon Øregaard. Hann leggur stóran dent á, at hann ikki vil taka nakað frá Fiskivinnuskúlanum, og at hann veit, at teirra umstøður eisini eru herviligar. – Men, leggur hann síðani afturat, – tað er so sera skuffandi at síggja, at vit enn einaferð verða yvirhálaðir á málstrikuni. Í fjør, tá okkara arbeiði skuldi byrja, skuldi miðnámsskúlin í Vági fyrst fáast frá hondini og bleiv tikin framum. Tað var so í lagið, tí vit fingu lyfti um, at vit stóðu næstir á listanum. Men nú sær tað út til, at vit enn einaferð verða snýttir á málinum. Fiskivinnuskúlar yvirhála okkum á báðum síðum, sigur Egon.

### Tjóðveldið sveik

Hann sigur seg somuleiðis harmast almikið um, at Tjóðveldisflokkurin, sum arbeiddi nógv við málinum um Skúladepilin, nú tykist hava vent teimum baki. – Teir hava í 2004 havt uppskot frammi um tríggjar skúlar, men teir nevna ikki okkum við einum orði. Tað skuffar meg ómetaliga nógv, sigur Egon, sum veruliga væntaði, at okkurt gott for at spyrjast burturúr øllum stríðnum.

Hann sigur, at tá tosið um at útvega Tekniska skúla í Havn nýggj høli av fyrstan tíð byrjaði, vóru hvørki Miðnámsskúlin í Vági ella Fiskivinniuskúlin í Vestmanna til. – Vit hava verið útsettir og yvirhálaðir í 30 ár. Hallirnar í Smiðjugerði vóru ein neyðloysn, sum vit bert skuldu húsast í, inntil okkurt betri varð funnið. Nú er nýggja ætlanin klár, men tað sær framvegis út til, at vit vera raðfestir lægri enn hinir skúlarnir. Nú hastar tað veruliga hjá okkum, og eg veit at støðan er tann sama hjá Studentaskúlanum og HF-skeiðnum, sigur Egon.

### Hava lagt fram

Egon Øregaard sigur, at samgongan vísti ætlanini nakað av áhuga í vár, tá Jógvan á Lakjuni, mentamálaráðharri, kallaði arbeiðsbólkin inn til fundar. Teir løgdu tá ætlanina fram fyri hann, og ráðharrin tyktist vera áhugaður og positivur um ætlanina.

Egon sigur seg vita, at mentamálaráðharrin síðani hevur lagt ætlanina fram fyri landsstýrið. Men har tykist tað eisini steðga upp, tí síðani fundin tíðliga í vár, hevur eingin av skúlastjórunum hoyrt hvørki orð ella eið frá mentamálaráðnum, samgonguni, løgmanni ella andstøðuni.

– Tað, at eingin nevnir okkum ella ætlanina, meðan aðrir skúlar verða uppprioriteraðir, er óalmindiliga skuffandi. Tað tykist, sum um vit eru dottnir burturímillum onkustaðni. Hølisviðurskiftini, serliga hjá okkum og studentaskúlanum, eru út av lagið vánalig. Eg kann t.d. nevna, at vit húsast undir átta ymiskum lonum og á trimum ymiskum adressum. Tað kann als ikki góðtakast, sigur Egon.

Hann heldur gongdina í málinum vera harmilga. Serliga tá stykkið, ið depilin skuldi byggjast á, stendur órørt og byggiætlanin er klár, gjørd av trimum samdum skúlastjórum. – Eg veit, at henda ætlanin er stór og dýr, men hon loysir so sanniliga eisini nógvar trupulleikar. Bæði vit og studentaskúlin mugu hava nýggj høli ógvuliga skjótt, og fyrimunirnir við at byggja hølini saman eru nógvir, heldur Egon, sum inniliga vónar, at hesir tríggir týdningarmiklu skúlar ikki aftur fara at verða gloymdir og lægri raðfestir, nú felags ætlanin endiliga er komin so langt.

## Fíggjarstøðan avgerðandi



Andrias Petersen, formaður í mentanarnevndini, sigur seg ikki hava hoyrt nakað nýtt í málinum um Skúladepilin.

– Uppskotið er framvegis í mentamálastýrinum, og tað er ikki komið í mentanarnevndina enn, sigur hann. Eg havi einki hoyrt um, at ætlanin er slept, men tað er ein stórur fíggjarligur spurningur, hvørt hon verður til nakað ella ikki, sigur Andrias Petersen.

Hann vísir á, at tað ikki eru so nógvir pengar til, so okkurt má sparast onkustaðni. – Vit eru greiðir um, at skúlarnir eru í veruligum trupulleikum, men nú fáa vit at síggja eftir at fíggjarlógaruppskotið kemur, hvussu prioriteringarnar verða, sigur hann. – At málið ikki er komið víðari, má vera orsakað av fíggjarligu støðuni, tað gangi eg út frá, sigur Andrias Petersen.

Málið liggur sostatt framvegis í Mentamálaráðnum, og eingin støða er tikin enn.

**Eys**

# Ætlanin má ikki sleppast

**Høgni Hoydal í Tjóðveldisflokkinum heldur tað vera stórt spell, at málið um Skúladepilin í Marknagili er steðga upp. – Uppskotið, sum nevndin við teimum trimum skúlastjórunum á odda kom við, er sera gott. Hóast Tjóðveldisflokkurin ikki er komin við einum nýggjum uppskotið um skúladepilin, stuðla vit framvegis ætlanini fult út, sigur hann**

SKÚLADEPILIN
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*



*Høgni Hoydal sigur, at Tjóðveldisflokkurin framvegis stuðlar ætlanunum um Skúladepilin. – Vit fara at nýta tey politisku amboðini, vit hava, at fáa ætlanina framda, sigur hann*

Formaðurin í Tjóðveldisflokkinum hevur enn ikki slept ætlanunum um, at hava ein stóran skúladepil í Marknagili.

– Tað var sera stórt spell, at álitið ikki náddi at koma út til almenningin. Men Anita (á Fríðriksmørk, sum tá var landstýriskvinna í mentamálaráðum, eys) náddi bert at fáa álitið handað, áðrenn nývalið var útskrivað, sigur Høgni Hoydal. Hann sigur, at tað er at harmast um, tí álitið er sera væl úr hondum greitt.

– Vit settu eina bygginevnd, ið var mannað av skúlastjórunum og formonnum í skúlastýrunum. Teir kenna tørvin best, og saman evnaðu teir eina ómetaliga góða ætlan, sum teir nevndu »Víðsjón«. Teir vita akkurát hvat kann fáast burturúr, soleiðis, at skúlarnir hava egnar facilitetir hvør sær, men samstundis kunnu hava ymiskt í felag, t.d. bókasavn, sigur Høgni Hoydal.

Hann sigur víðari, at hann hoyrdi í løgmansrøðuni, at eitt projekt lá fyri framman og bíðaði, og hann gongur út frá, at talan má vera um skúladepilin í Marknagili. Annars staðfestir hann, at hann ikki hevur hoyrt nakað um, hvat samgongan vil við málinum. – Vit fingu eina semju í lag við Fólkaflokkin, Miðflokkin og Sjálvstýrisflokkin, um at fáa ein Skúladepil í Marknagili. Nú er spurningurin so hvat núverandi samgonga vil, sigur Høgni Hoydal.

Hann sigur seg vóna, at Fólkaflokkurin heldur fast um ætlanina, sum er ótrúliga góð. – Eg vænti, at ætlanin fer at verða veruleiki, tí tørvurin er so stórur og tí, at hetta er eitt álit gjørt av trimum samdum skúlastjórunum, sigur hann. – Tað hevur stóran týdning, at skúlarnir eru samdir um ætlanina og standa aftanfyri.

### Ikki nevnt skúladepilin

Tjóðveldisflokkurin hevur annars havt fleiri uppskot frammi, um at byggja og útbyggja skúlar kring landið. Teir hava skotið upp at hava ein lista- og ítróttarskúla á Sandi, at útbyggja tekniska skúlan í Klaksvík og at byggja nýggjan Fiskivinnuskúla í Vestmanna. Men einki uppskot hevur verið um Skúladepilin í Marknagili.

– Í undanfarnu samgongu samdust vit um, at skúlar og útbúgvingar skuldu vera tað økið, ið skuldi standa næst á skránni. Tað er jú so sera týdningarmikið at gera íløgur í skúlar og útbúgvingar, serliga nú, tá tíðirnar tykjast gerast verri. Tá samdust vit um, at tað vóru Miðnámsskúlin í Vági, Skúladepilin í Marknagili, Lista- og ítróttarskúlin á Sandi, Tekniski Skúli í Klaksvík og Fiskivinnuskúlin í Vestmanna, sum skuldu raðfestast. Skúlin í Vági kom frá hondini, men so kom valið í úrtíð, greiðir Høgni Hoydal frá.

– Einki uppskot er komið um Skúladepilin. Nú hava vit lagt uppskot fram um hinar tríggjar skúlarnar, men tað merkir ikki, at Tjóðveldisflokkurin ikki framvegis tekur undir við ætlanini um skúladepilin, staðfestir Høgni. – Tað er bara nakað nógv at leggja fram fýra uppskot um skúlar, sigur hann.

– Hinir skúlarnir skulu eisini raðfestast. Eg vóni og vænti avgjørt, at skúladepilin fer at verða veruleiki, tí skúlarnir standa samdir aftanfyri ætlanina. Vit hava sum sagt ikki slept ætlanini, tvørturímóti fara vit, við teimum politisku amboðunum, vit hava, at royna at fáa hesa ætlanina framda. Skúlarnir kosta nógv, men samanborið við t.d. ein undirsjóvartunnil, eru upphæddirnar til skúlar ógvuliga smáar, staðfestir formaður Tjóðveldisfloksins at enda.